NÁM

Fólkaskúli - 9. flokksstig

# FØROYSKT
# Framseting

1. dømi um uppgávusett

**1. august 2024**

# Innihaldsyvirlit


| | |
|---|---|
| Uppgáva 1: | Træið......3 |
| | Jenny Svabo: Træið......4 |
| Uppgáva 2: | Ein framtíð uttan burturkast - ber tað til?......6 |
| | IRF: Burturkasttrappan......7 |
| Uppgáva 3: | At vera 16 ár......8 |
| | Dania Tausen: 16 ár (brot)......9 |
| Uppgáva 4: | Sálina eiga vit øll......11 |
| | Fólkaheilsuráðið: ABC fyri sálarliga heilsu......12 |
| Uppgáva 5: | Talv krevur nógv av heilanum......13 |
| | Danial Viðoy: Talv krevur nógv av heilanum......14 |


Kunning til próvtakara:
- Hóskandi longd er 1,5-2,5 síður á 2.400 sløg.
- Reglufrástøðan skal vera 1,5, og skriftstøddin skal vera 12.
- Brúka skrift við fótum, t.d. Times New Roman.
- Sitat skulu frámerkjast við skákskrift ella gásareygum.
- Brúkar tú keldur, skulu tær uppgevast inni í tekstinum, ikki í fótnotu.

# Uppgáva 1 | Træið

Greina og tulka stuttsøguna "Træið" (s. 4) við serligum atliti at, hvussu og hví lýsingin av trænum broytist gjøgnum søguna.

Met um, hvør boðskapurin í stuttsøguni er, og sig tína hugsan um evnið, ið stuttsøgan viðger.

Yvirskrift: Træið

Í dømingini verður mett um tín førleika at nýta faklig amboð og háttaløg og við ítøkiligum dømum úr tekstunum at grundgeva fyri tínum svari. Eisini verður mett um tíni evni at gera sjálvstøðugar metingar og grundgeva fyri teimum. Dentur verður eisini lagdur á, at avrikið er væl skrivað og skilvíst bygt upp.

Í lidna avrikinum eigur fyrri parturin av uppgávuorðingini – greina og tulka – at fylla umleið helvtina og seinni parturin – met um og sig tína hugsan – umleið helvtina í longd. Harafturat koma inngangur og útgangur.

# Træið

Jenny Svabo (f. 1990)
Úr mentanarritinum *Varðin* nr 89, 2022.

Fólk komu úr øllum heimsins heraðshornum at vitja Alrúnsskógin.Tey grønastu granntrøini, ið gjørdust so sjáldsama høg, sóust har, so langt eygað rakk. Friðsælt og hugnaligt var at ganga har ímillum tey. Langt inni í tí vakra Alrúnsskóginum stóð ímillum øll granntrøini eitt heldur øðrvísi træ — ikki kundi tað kalla seg eitt granntræ, ei heldur siga seg hoyra til annað ávíst træslag. Ongantíð hevði tað møtt nøkrum træi, ið liktist tí. Meðan greinarnar á granntrøunum vóru at kalla javnfjarar hvør við aðra og samdar um, hvønn rætning tær fóru, var tað kronglut við longum, bogaðum greinum, ið fóru í allar ættir. Eins og granntrøini var tað, hóast sítt sjáldsama skap, sera vakurt. Mangan steðgaðu fólk hugtikin á fyri at eygleiða tað — nei, aldrin áður høvdu tey sæð eitt træ sum hetta, so sera sjáldsamt, og tó so avbæra vakurt á sín egna hátt.

Træið hugsaði ikki um, at tað var øðrvísi, tað eksisteraði bara soleiðis, sum tað var. Dagarnir gingu við at spæla við hini trøini í skóginum. Einaferð hevði onkur træta tikið seg upp, sum vera man, og eitt granntræ hevði tá í illsinni gjørt vart við, hvussu træið als ikki var sum tey og ikki hoyrdi til í Alrúnsskóginum. Tað hevði nevnt tær kronglutu greinarnar, ið fóru í allar ættir, sum var onki skil á teimum. Heldur ikki hevði tað nakað grann — ongin hevði funnið upp á at brúkt tað sum eitt jólatræ. Tað hevði ikki latið við seg komið, og í langa tíð var tað saman við hinum trøunum sum áður, men tó vóru hesi orðafræ plantað í tað, og oftari tað hoyrdi tað sama umaftur, meira spíraði fræið. Í staðin fyri at góðtaka tær kronglutu greinarnar sum ein part av, hvør tað var, byrjaði træið at seta spurning við seg sjálvt. Gekk okkurt galið, mátti tað vera tí, at tað var so øðrvísi. Rótin vaksin frá lítla orðafrænum gjørdist væl fest djúpt niðri í jørðini. Onki dámdi tað sínar ljótu og kronglutu greinar, tað kagaði eftir greinunum á granntrøunum og sá, hvussu gott skil var á teimum. Hví stóð tað yvirheøur har? Tað kundi ikki líkst minni einum vøkrum granntræi, ikki ein tann einasta grein á tí vaks flott og beint sum á teimum — tað mátti vera heilt miseydnað.

Træið byrjaði at taka tær greinarnar, ið vóru mest kronglutar, av sær. Nú var tað minni sjáldsamt. Men enn var tað ikki sum hini, og hvønn dag tók tað fleiri og fleiri greinar av sær, øll tíð og orka fór til hetta. Tað helt uppat at vaksa og sansaði lítið annað enn, hvussu skeivt tað var. Sólina, ið skein so avbæra vakurt ímillum øll trøini og fekk allan skógin at glitra, legði tað ikki merki til. Tær vøkru blómurnar, ið spruttu hvørt vár, sá tað ikki, og fuglasongin, ið tað einaferð hevði elskað so, hoyrdi tað ikki longur. Sum tíðin leið, snakkaði tað ljótari við seg sjálvt, tað skilti ikki, hví tað skuldi vera so andskræmiliga ljótt og vanskapt. Tað skræddi greinarnar av sær, ímeðan tað fýltist á tær, ein fyri og onnur eftir vórðu tær kastaðar til jarðar, í bræði beindi tað burtur alt tað, ið skilti tað burturúr — ikki gekk long tíð, so sá mann í Alrúnsskóginum hetta nakna træið, har brotnar greinar og følnað bløð, sum ormur var farin at eta av, lógu og sløddust allastaðni runt um tað. Tær greinarnar frá granntrøunum, ið tað fann liggjandi á jørðini, royndi tað at seta á seg, men hvussu tað so stríddist, eydnaðist tað ikki at fáa tær at gerast ein partur av sær.

Tað gjørdist oftari sjúkt, og teir køldu vetrarnir vóru harðir at koma ígjøgnum sum ein nakin viðarbulur. Hóast tað enn var ungt av aldri, var tað farið at hokna til jarðar. Ljótari og ljótari gjørdist tað á at líta. Tað rotnaði innanífrá, og soppur fór at vaksa á tí. Fólkini, ið gingu í skóginum, øtaðust við, tá ið tey komu fram á hetta træ. Nei, sum hatta er eitt ljótt og forfallið træ, spell, at tað skal standa her í einum annars so vøkrum skógi sum Alrúnsskóginum.

Træið var onki av tí, tað hevði verið, tað var alt burturbeint, heldur ikki var tað eydnast tí at bliva sum hini. Og nú stóð tað har. Eitt nakið og forfallið træ, rotið og børkurin, ið eftir var, kundi ein lættliga skava burturav. Innan stutta tíð doyði træið.

# Uppgáva 2 | Ein framtíð uttan burturkast - ber tað til?

Skriva eina ritroynd við støði í tekstinum "Burturkasttrappan" (s. 7) hjá IRF. Í ritroyndini skalt tú millum annað skriva:

- Hvussu nógv tíni atlit til burturkast fylla í gerandisdegnum.
- Hvørji sløgini av burturkasti eru.
- Hvussu tú metir støðuna við burturkasti í Føroyum fara at vera um 20 ár.

Yvirskrift: Ein framtíð uttan burturkast - ber tað til?

Í dømingini verður mett um tín førleika at nýta faklig amboð og háttaløg og við ítøkiligum dømum úr tekstinum at grundgeva fyri tínum svarum. Eisini verður mett um tíni evni at gera sjálvstøðugar metingar og grundgeva fyri teimum. Dentur verður eisini lagdur á, at avrikið er væl skrivað og skilvíst bygt upp. Minst til inngang og útgang.

**Ritroynd:** Ein ritroynd er ein stutt grein ella ritgerð, sum viðger eitt evni uttan at fara út í æsir. Verður roknað sum yrkistekstur, men kann hava ein skemtiligan dám og skaldsligt mál.

# Burturkasttrappan

IRF
Av heimasíðuni www.irf.fo.

## BURTURKASTTRAPPAN

Burturkasttrappan vísir okkum, hvussu vit skulu handfara burturkast fyri at verja umhvørvið og leingja um livitíðina á virðismiklum tilfeingi og soleiðis halda tilfeinginum í ringrás.

**Burturkasttrappan hevur fimm trin:**
1. Fyribyrging, 2. Endurnýtsla, 3. Endurvinning, 4. Orkuútvinning og 5. Tyrving.

Tess longur upp tú kemur á trappuni, tess betri er tað fyri umhvørvið.




### 1: FYRIBYRGING

Tað allarbesta fyri umhvørvið er at fyribyrgja, at burturkast verður framleitt. Hetta gert tú við at vera tilvitað/ur um nýtsluvanar og innkeyp. Tú kanst t.d. velja at keypa góðskuvørur við longri livitíð heldur enn einnýtisvørur. Tú kanst keypa frá fyritøkum, ið framleiða vørur, sum kunnu umvælast og hava eina skynsama framleiðslu, har spill í minst møguligan mun kemur fyri. Týdningarmest er tó at hugsa um bert at keypa tað, sum tú veruliga hevur brúk fyri, og í mest møguligan mun at nýta tað, sum tú hevur ella møguliga læna frá øðrum.

### 2: ENDURNÝTSLA

Tú kanst gleða onnur við at lata innbúgv, klæðir, byggitilfar v.m., sum tú ikki longur brúkar, til onnur at endurnýta. Endurnýtsla kann eisini vera, at lutir fáa eina nýggja funktión heima hjá tær sjálvum – t.d. tá ið pallurammur verða til blómukassar. Endurnýtsla sparir bæði tær og umhvørvinum tíð, tilfar, orku og pengar.

### 3: ENDURVINNING

Tá vit endurvinna burturkast, nýta vit tilfarið í burturkastinum til at gera nýggjar vørur. Eitt dømi um hetta er, tá ið trol verður endurvunnið og gjørt til nýggjar plastvørur. At endurvinna tilfar krevur orku, men tilfeingið í burturkastinum verður nýtt aftur og á henda hátt hildið í ringrás.

### 4: ORKUÚTVINNING (BRENNING)

Tá burturkast verður brent, ber til at gagnnýta hitan frá brenningini til fjarhita. Tískil er betri at brenna burturkast enn at tyrva tað. Vit kunnu tó bert brenna burturkastið eina ferð, og tískil verður tilfeingið í burturkastinum ikki hildið í ringrás, tá ið vit brenna tað.

### 5: TYRVING

Niðasta trin á trappuni er tyrving, og hetta er, tá ið burturkastið verður grivið niður. Tá vit tyrva burturkast, fáa vit ikki gagnnýtt tilfeingið í burturkastinum. IRF arbeiðir tí við at flyta burturkastbólkar, sum í dag verða tyrvdir, upp eftir trappuni, soleiðis at tilfeingið í burturkastinum í størri mun kann haldast í ringrás.

Tel +298 414243 · irf@irf.fo · www.irf.fo

IRF

[Leinki til pdf-fílu]

# Uppgáva 3 | 16 ár

Greina og tulka brotið úr yrkingini "16 ár" (s. 9). Í greiningini skalt tú millum annað skriva:

- Hvussu yrkingin er bygd upp.
- Hvussu málið í yrkingini er.

Met um, hvat yrkjarin vil siga við yrkingini, og greið frá tínari hugsan um, hvat ung lesa og kunnu fáa burtur úr at lesa.

Yvirskrift: 16 ár

Í dømingini verður mett um tín førleika at nýta faklig amboð og háttaløg og við ítøkiligum dømum úr tekstinum at grundgeva fyri tínum svarum. Eisini verður mett um tíni evni at gera sjálvstøðugar metingar og grundgeva fyri teimum. Dentur verður eisini lagdur á, at avrikið er væl skrivað og skilvíst bygt upp.

Í lidna avrikinum eigur fyrri parturin av uppgávuorðingini – greina og tulka – at fylla umleið helvtina og seinni parturin – met um og greið frá – umleið helvtina í longd. Harafturat koma inngangur og útgangur.

# 16 ár

Dania O. Tausen (f. 1998)
Brot úr yrkingini "16 ár" úr yrkingasavninum *Skál*, 2020.

1. Hon gongur stillisliga fram við bókahillunum
og letur fingraspíssarnar sansa hvørja einastu bók.
Tað er fyrstu ferð hon er her einsamøll og av egnum vilja.
Bøkurnar standa tættar.
Fleiri av teimum hava sama rithøvund.
Aðrar standa óynsktar saman.
Púrasta hvør sínar.

2. Hon granskar ymiska tilfarið, sum bøkurnar eru gjørdar úr.
Leður, pappír og tpy í ymiskum tjúkdum og støddum.
Litirnir broytast fyri hvørja bók fingurin nertur við.
Hon varnast fína munin á litunum,
alt eftir hvørjum tilfari teir eru á.
Um teir vátir súgva seg í eitt grovt pappír,
ella um teir, millum heitar plátur,
verða trústir á blankt leður.
Sjálvt hvítu pappírini hava ymiskan dám.
Kritahvítt, eggjahvítt, kremfarvað, bláhvítt.

3. Hon hevur átt tríggjar Bíbliur
í trimum ymiskum støddum og litum.
Eina lítla vínreyða, eina miðalstóra svarta
og eina stóra hvíta.
Allar við gullstavum á kápuni
og stroyddar við gulli eftir síðunum.
Hon minnist, hvussu hon plagdi at leita eftir gullinum
á einstøku baksíðunum,
tá tær ikki lógu saman við hinum.
Men tað sást bara í heildini.
Og sum tíðin leið, átti gullið at fána.
Tað var eitt gott tekin.
Tá sóu øll, at tú vart ágrýtin at lesa.

4. Hon plagdi onkuntíð at stoyta vatn á
og boyggja síðurnar allar vegir,
so tær loysnaðu eitt sindur og vórðu mislittar.
Tað var serliga við tí fyrstu vínreyðu,
at hon gjørdi tað.
Hana fekk hon sum smábarn.
Við inngraveraðum navni.
Summi kallaðu hana kirkjufólkabíbliuna.
Seinni fekk hon týðingina hjá Victori Danielsen.
Henni dámdi henni væl at lesa í,
um tað var okkurt í hinari, hon ikki skilti.
Um hon framvegis ikki skilti tað,
royndi hon ta stóru hvítu, sum var á enskum,
fyri at vita, um tað hjálpti.

5. Hon steðgar við eina hill og ber eyga við eitt yrkingasavn.
Jóanes Nielsen[1].
Hm.
Her eru so nógv nøvn, hon ikki kennir.
Søgur, hon ikki hevur lisið.
Fólk, hon ikki hevur lært at skilja enn.
Hon vil kenna tey,
sum hon kennir tær 66 bøkurnar í Bíbliuni.
Granska tey, eins og hon hevur granskað Gud,
øll hesi 16 árini hon hevur verið lesifør.
Hon blaðar í gjøgnum savnið
og merkir beinavegin,
hvussu tað opnar nýggjar síður í sær.

(...)

---

1 Jóanes Nielsen (f. 1953) er føroyskur rithøvundur, sum bæði hevur skrivað skaldsøgur, leikrit og yrkingar. Í skrivistíli er hann stundum speirekandi og satiriskur, men hann er eisini skemtandi og lívsjáttandi og lýsir inniligar og eymar kenslur.

# Uppgáva 4 | Sálina eiga vit øll

Greina samskiftið í lýsingarfilminum *ABC fyri sálarliga heilsu* (s. 12). Í greiningini skalt tú millum annað:

- Greiða frá, hvat lýsingarfilmurin snýr seg um.
- Lýsa huglagið í lýsingarfilminum.

Harafturat skalt tú:

- Siga, hvat tú heldur um lýsingarfilmin og hví.
- Siga tína hugsan um sálarheilsuna hjá børnum og ungum.
- Vísa á, hvat annað vit kunnu gera fyri at tryggja eina góða sálarheilsu hjá børnum og ungum.

Yvirskrift: Sálina eiga vit øll

Í dømingini verður mett um tín førleika at nýta faklig amboð og háttaløg og við ítøkiligum dømum úr tekstinum at grundgeva fyri tínum svarum. Eisini verður mett um tíni evni at gera sjálvstøðugar metingar og grundgeva fyri teimum. Dentur verður eisini lagdur á, at avrikið er væl skrivað og skilvíst bygt upp.

Í lidna avrikinum eigur fyrri parturin av uppgávuorðingini – greina, greiða frá og lýsa – at fylla umleið helvtina og seinni parturin – siga, hvat tú heldur, siga tína hugsan og vísa á – umleið helvtina í longd. Harafturat koma inngangur og útgangur.

# ABC fyri sálarliga heilsu

Fólkaheilsuráðið
Partur av lýsingarátaki hjá Fólkaheilsuráðnum í 2021.




Leinki til lýsingarfilm

# Uppgáva 5 | Talv krevur nógv av heilanum

Greina blaðgreinina "Talv krevur nógv av heilanum" (s. 14). Kom millum annað inn á bygnað, tekstslag og málburð.

Met um fyrimunir og vansar við at velja sær eina ítróttagrein á so ungum aldri. Greið síðan frá einum av tínum frítíðaráhugamálum og grundgev fyri, hví tú hevur valt tað.

Yvirskrift: Talv krevur nógv av heilanum

Í dømingini verður mett um tín førleika at nýta faklig amboð og háttaløg og við ítøkiligum dømum úr tekstinum at grundgeva fyri tínum svarum. Eisini verður mett um tíni evni at gera sjálvstøðugar metingar og grundgeva fyri teimum. Dentur verður eisini lagdur á, at avrikið er væl skrivað og skilvíst bygt upp.

Í lidna avrikinum eigur fyrri parturin av uppgávuorðingini – greina – at fylla umleið helvtina og seinni parturin – met um og greið frá – umleið helvtina í longd. Harafturat koma inngangur og útgangur.

# Talv krevur nógv av heilanum

Danial Viðoy
Grein í *Sosialinum*, 23. apríl 2024.




[Leinki til grein](#)

## Fjølrit

Jenny Svabo: Træið.
Varðin, bind 89, 2022.

IRF: Burtutkasttrappan.
www.irf.fo.

Dania O. Tausen: 16 ár.
Skál, 2020.

Fólkaheilsuráðið: ABC fyri sálarliga heilsu.
www.youtube.com.

Danial Viðoy: Talv krevur nógv av heilanum.
Sosialurin, 23. apríl 2024.